átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*

# Sálmarnir skapa eina undran um lívið

**- Sálmar eru eins og veitsluklæðir, sum ein brúkar við serligar løtur. Og tað haldi eg er stórt spell, sigur songkvinnan Ann-Mette Elten. Sjálv er hon vaksin upp í kirkjuni og verður framvegis rørd av sálmunum**




*- Eg vil geva fólki nakað at hugsa um, sigur Ann-Mette Elten, sum í desember mánaði gav út eina fløgu við sálmum, ið hon nevnir »Vær Velkommen«*

Mong kenna helst Ann-Mette, sum songkvinnuna, ið gav sanginum "Hjem til Århus" lív, saman við bólkinum "På Slaget 12".

Men við seinastu útgávu síni fer hon aftur til kristnu røtur sínar. Tí, sum hon sjálv sigur tað: - Sálmarnir nerta við nakað djúpt í øllum menniskjum!

Í desember mánaði í fjør gav hon út fløguna "Vær Velkommen" – hesaferð við kendum donskum sálmum.

Endamálið við fløguni er, at fáa fólk bæði í vertshúsum og heima við hús at síggja dýrgripin í teimum.

Yndlingssálmur hennara er "Hil dig frelser og forsoner". Hetta er ein játtanarsálmur, sum framvegis rørir við Ann-Mette.

- Hesin sálmurin sigur frá tí kristna boðskapinum, soleiðis at vit fáa hann í síni heild, sigur hon.

## Ein djúp ætlan

Spyrt tú kendu songkvinnuna, sum í summar verður 52 ár, so sigur hon seg sjálva vera meiri trúgvandi enn ivandi. Í hennara lívi finnast fleiri kristin spor.

- Longu sum 7-8 ára gomul gekk eg í eini fríkirkju, sum lá beint við barnaheimið.

- Seinni fekk eg eina vinkonu, sum var sera virkin í Frelsunarherinum. Tað gjørdi sítt til, at eg varð soldátur har, frá tí eg var 12 til eg var 18. Eg varð sera fegin um boðskapin og tann sosiala felagsskapin, sigur Ann-Mette við kristna danska vikublaðið Udfordringen.

Í studentaskúlanum kom hon so líðandi burtur frá tí virkna kristinlívinum, men tá hon fór á universitetið í Århus valdi hon kortini at lesa kristnikunnleika.

- Eg dugdi kortini ikki at síggja meg sjálva sum prest, men meiri sum ein ið undirvísti í kristindómi. Tí tók eg kristindóm sum hjágrein og danskt sum høvuðsgrein, sigur hon.

Við nýggju fløgu síni fær hon kortini prædikað á ein annan hátt. Ynskið hennara er við fløguni er at fáa fólk til umhugsan.

- Eg vil geva fólki nakað at hugsa um. Ein hittir jú sálmarnar aftur og aftur gjøgnum lívið. Hóast ein ikki er fastur kirkjugangari, leitar ein jú í kirkjuna, tá tað hendir eitthvørt hjá eins næstringum. Og tað nertir við ein, í roynd og veru soleiðis at ein ikki kann sleppa tí aftur.

- Eg vóni, at tá fólk hoyra sálmarnar so skapar tað eina undran um tilveruna. At tey fáa eina uppliving, har tíðin stendur í stað, og har tey hugsa djúpari um, at vit sum menniskju eru partur av eini størri heild, sigur Ann-Mette við blaðið.

Sálmarnir hava tíðarleys løg við tekstum, sum sjálvandi eru merktir av síni tíð, men sum kortini siga nakað, sum øll menniskju framvegis kunnu brúka.

Eftir hennara hugsan, geva fólk í dag sær ikki nóg góðar stundir til andaligar hugleiðingar.

- Vit gloyma at hugsa um ta djúpu ætlanina við lívinum, slær Ann-Mette fast.

## Ikki vandamikið

Ann-Mette svikstartaði við at syngja sálmar, tá hon undir eini konsertferð brádliga sang sálmin "Se nu stiger solen".

- Eg gjørdist púra bilsin, tá eg sá reaksjónirnar hjá fólki. Eg syngi mest í smáum mentunarhúsum, sum á mangar mátar kunnu samanberast við vertshúsumhvørvið. Í hesum samanhangi koma orðini til at standa á ein nýggjan hátt.

- Her var sera stórur opinleiki, og fólk tóku sálmin til sín. Fyrr plagdu fólk at fáa paniskan ótta, tá tað snúði seg um átrúnað, men í dag er ikki vandamikið at koma við einum teksti sum nevnir Gud.

---



orðið



*Hesa vikuna:*

**Susanna Kass Kristiansen, Nes**

### Nýt tína talent!

Í Matt. 25,14-30 fortelur Jesus eitt líknilsi um talentir:

Húsbóndin gav húskallunum nakrar talentir í part, hvørjum eftir sínum førimuni. Ein fekk 5 talentir, ein annar fekk 3, og ein fekk 1 talent. Tann, ið hevði fingið 5 talentir, fór og handlaði við teimum og vann aðrar fimm, ímeðan tann, sum hevði fingið eina talent, fjaldi hana í jørðina. Tá húsbóndin kom heim, var hann glaður um teir, sum høvdu nýtt teirra talentir og vunnið aðrar. Húsbóndin var óður við tann, sum hevði fjalt sína talent.

Gud hevur givið okkum øllum talentir, summi fleiri og summi fáar. Gud ynskir, sum víst verður til í líknilsinum, at vit skulu nýta okkara talentir.

Vit hoyra oftani fólk siga:

- Eg dugi einki og kann ikki brúkast til nakað. Men í Bíbliuni lesa vit, at øll eru vit serstakliga týdningarmikil. Øll hava vit í minsta lagi eina talent, sum vit kunnu æra okkara Faðir við. Onkur hevur fingið evnir til at tala, onnur til at syngja, ítrótt, handaligt arbeiði og so framvegis.

Gud ynskir, at vit brúka tey evni (talent), sum hann hevur givið okkum. Vit kenna ofta, at okkara arbeiði er gjørt til einkis, og at eingin hevur fingið gleði av tí, men tá er tað, at Gud kann leggja signing til. Um vit eru lýðin og líta á hann og stíga út á hansara lyfti, so hevur hann lovað okkum, at hann vil hjálpa og leggja tað afturat, sum skal til fyri at "vinna aðrar talentir".

Sum sunnudagsskúlasangurin sigur:

*»Eg kann ikki tað, tú kann*
*tú kann ikki tað, eg kann*
*men Gud hevur gerning, sum*
*hóskar til tín*
*og ein annan, sum hóskar til mín*
*Tað, eg dugi til, vil eg gera væl*
*og tað, eg ikki kann, vil ein annar*
*fegin gera..«*

Tað er sera týdningarmikið, at vit gerast greið yvir okkara talentir og nýta tær! Vit eru fleiri limir sum skulu virka saman í einum líkami.

Gud ynskir at brúka teg í sínum víngarði. Tú ert týdningarmikil fyri honum!

---



### Kristin gentufest

**Oslo:** Í fjør savnaði felagsskapurin JesusKvinner meiri enn 7000 kvinnur úr Noregi og øðrum londum til ráðstevnu í Oslo Spektrum. Í ár er ætlanin at røkka teimum ungu gentunum seinasta vikuskiftið í mai mánaði. - Vit hava altíð havt nógvar gentur á ráðstevnum okkara. Men í ár er tíðin komin til at venda eyguni ímóti teimum, bæði í stíli og innihaldi, sigur Anne Christiansen, sum er leiðari í felagsskapinum við blaðið Korsets Seier. Millum gestirnar á ráðstevnuni í ár verður heimskenda songkvinnan Rebecca St. James (myndin).

### Kvinnur savnast

**Bønardagur:** Í kvøld verður hildin altjóða bønardagur fyri kvinnur. Hesin bønardagurin hevur mong ár á baki, og hevur savnað kvinnur úr nógvum saman í bøn. Í Føroyum verður høvið at savnast á trimum støðum – í Filadelfia í Havn, í Frelsunarherinum í Vági og í Emmaus í Klaksvík. Á øllum støðum byrjar tiltakið kl. 19:30.

### Erla samskipar

**Fuglafjørður:** Saman við landsarbeiðinum hjá Heimamissiónini hevur missiónshúsið Thabor sett 20 ára gomlu Erlu Hansen (myndin) í starv sum samskipara. Hon skal arbeiða við hesum 15 tímar um vikuna fram til summarferiuna millum annað við umsiting, tónleiki og ungdómsarbeiði í býnum. Umframt hetta starvið, er hon stuðul hjá einum barni.



sosialurin